FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

15. september 2025
Mál: 25/23487-2

Tygara skriv: 52-008/2025

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-008/2025 frá Hans Jacob Thomsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um Galaxy sum avloysaraskip fyri Smyril**

Fyrispurningurin er soljóðandi

1. Hvat er kostnaðurin hjá Strandfaraskipum Landsins at leiga ferjuna Galaxy?
2. Nær varð sáttmáli undirskrivaður við felagið, sum eigur ferjuna Galaxy?
3. Vóru aðrar ferjur, ið lúka krøvini til at avloysa Smyril, tøkar at leiga?

**Hans Jacob Thomsen, viðmerkingar**
Ferðasambandið til Suðuroynna er ikki nøktandi, nú Smyril er í dokk, og Galaxy røkir suðuroyarleiðina. T.d. er talið av ferðafólki avmarkað, og tað viðførir stórar avbjóðingar, ikki bara fyri suðuroyingar, men fyri øll, ið hava tørv á at brúka leiðina.

Tað er ongin loyna, at fólk eru ónøgd, og seta spurningar við, hvussu vit aftur nú eru endað við einari loysn, ið ikki er nøktandi.

Fólk seta spurnartekin við, um tað kann vera rætt, at ongin onnur ferja, ið kann røkja leiðina nøktandi, er at finna nakrastaðni, um SSL hevur brúkt nóg nógva orku til at finna rætta avloysaraskipið, og um tað í veruleikanum er ein spurningur um fíggjarliga raðfesting.

Fyri at fáa greiði á støðuni verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

**Svar til spurning 1**
Leigusáttmálin er gjørdur fyri í fyrstu atløgu 8 vikur, men við møguleika fyri at leingja við 2 vikum - til 10 vikur. Samlaði leigukostnaðurin fyri Galaxy er 21 mió. kr., um talan er um 8 vikur og 25 mió. kr., um talan er um 10 vikur.

Ministry of Fisheries and Infrastructure

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Sjálv leigan fyri 8 vikur er 12,6 mió. kr. umframt 5,25 mió. kr. fyri klárgering og avrigging og 3,15 mió. kr. í lønarútreiðslum til útlendsku manningina. Íalt 21 mió. kr.

Verður leigutíðarskeiðið 10 vikur, er sjálv leigan 15,75 mió. kr., klárgering og avrigging er 5,25 mió. kr., og lønarútreiðslur til útlendsku manningina 3-4 mió. kr. Íalt 25 mió. kr.

Manningin hjá reiðarínum hjá M/V Galaxy skuldi, sbrt. avgerð hjá Útlendingastovuni, vera fevnd av føroyskum lønar- og setanartreytum.

**Svar til spurning 2**
Leigusáttmálin fyri Galaxy varð undirskrivaður 30. mars 2025.

**Svar til spurning 3**
Strandferðslan kannaði í longri tíð, umvegis tríggjar føroyskar skipsmeklarar, marknaðin fyri leiguferjur til ta avmarkaða tíðarskeiðið, ið Smyril er í dokk.

Eins og øll undanfarin ár, tá nýggi Smyril hevur verið í dokk, er tað so at siga ógjørligt at finna eina ferju í eitt so avmarkað tíðarskeið, ið nøkulunda nøktar tørvin á suðuroyarleiðini. Eisini hóast tíðarskeiðið hesaferð var nakrar vikur longur enn vanligt, tí at talan er um 20 ára klassing, og stórarbeiði skulu gerast.

Arbeitt varð út frá eini 15 ymiskum møguligum ferjum, sum tó antin vóru ov langar, ikki kláraðu nóg væl alduhæddina ella ikki vóru tøkar ta tíðarskeiðið, ið Smyril er í dokk.

Við ferjuni Ben-My-Chree av Isle of Man, sum Strandferðslan var og hugdi nærri at í desember í fjør, hevði Strandferðslan ta fatan og vón, at møguleiki var fyri at gera eina leiguavtalu, men eigarin valdi tíverri eina aðra loysn.

Í apríl í fjør mælti Strandferðslan landsstýrinum til at fara í keypssamráðingar við eigararnar av ferjuni Volcan de Taburiente, heimahoyrandi á Gran Kanaria, sum var á støðd við Smyril og um sama aldur.

Hugsanin við slíkari eykaferju var, at um Smyril fekk eitt álvarsligt brek, so var altíð ein eykaferja tøk. Ferjan hevði so eisini kunnað virkað sum avloysaraferja, meðan Smyril er í dokk.

Strandferðslan metti tá samlaða útveganarkostnaðin til umleið 250 mió. kr. Harumframt eru rakstrarútreiðslur, viðlíkahaldsútreiðslur og annað.

**Jóhan Christiansen**
landsstýrismaður